# KUNNINGARSKRIV
# Um radiopróvbrøv

Krøvini eru í dag, at allr bátar av 8-mannafarastødd og størri skulu hava VHF-tól við DSC umborð. Fyri at DSC-eindin skal rigga, skal eitt 9-talað MMSI-nummar., sum Fjarskiftiseftirlitið tillutar, forritast í tólið. Hevur eigarin/bátsformaðurin ikki eitt av teimum nýggju radioprógvunum, SRC, ROC, LRC ella GOC, fær viðkomandi einki MMSI-nummar.

Í staðin fyri tað gamla VHF-radioprógvið eru nú tvey at velja ímillum, SRC ella ROC. Munurin á hesum báðum er, at próvtøkan til SRC er á føroyskum, meðan próvtøkan til ROC hevur lítla ískoytisroynd á enskum máli. Harumframt gevur ROC eisini rætt til sjóvinnubræv.

Próvtøkan í dag er skrivlig, umleið 40 margvalsspurningar, har krossast skal av, hvat rætta svarið er. Aftaná verður próvtøka í at brúka tólini.

Hevur viðkomandi næmingur longi frammanundan eitt av gomlu radioprógvunum, sleppur hesin undan skrivligu royndini, men skal bert hoyrast í nýtslu av tólunum. Hann skal tó hava møtt til alla frálæruna, sum er uml. 30 – 40 tímar.

Kostnaðurin liggur um einar kr. 1000,- fyri SRC og kr. 1200,- fyri ROC, Tá er skúlagjald, próvtøkugjald og lærubókin íroknað.

Skeið verða hildin á Vinnuháskúlanum, Klaksvíkar Sjómansskúka og á kvøldskúlunum kring landið. Sig Fjarskiftiseftirlitinum frá, um hetta hevur áhuga tygara.

Vónandi eru hesar upplýsingar nóg greiðar. Hava tit spurningar, eru tit vælkomin at seta tykkum í sanmand við Fjarskiftiseftirlitið, Tel.: 35 60 20 ella teldupost: kv@fse.fo

Fjarskiftiseftirlitið
7. septembur 2009